## Sernámsdepilin
Barna- og ungdómspsykiatriin

**Sernámsdepilin og Barna- og ungdómspsykiatriin skipa fyri skeiði 6. mai 2009 um**

### Autismu, ADHD/DAMP og tilknýtistrupulleikar v/Christopher Gillberg, professara

Týsdagin 6. mai kl. 9 – 15 skipar Sernámsdepilin saman við Barna- og ungdómspsykiatriini fyri skeiði í auluni á Føroya Læraraskúla. Skeiðið er um Autismu, ADHD/DAMP og tilknýtistrupulleikar hjá børnum og ungum.

Tá fer Christopher Gillberg, barna- og ungdómspsykiatari og heimskendur granskari við Universitetssjúkrahúsið í Gøteborg, at hava skeið, sum er ætlað foreldrum, lærarum, pedagogum, heilsurøktarfrøðingum, læknum, sálarfrøðingum og øðrum, sum hava við børn og ung at gera.

Lærarar, ið ætla sær á skeiði, skulu søkja um luttøku umvegis skúlaleiðaran.

Tilmelding fer fram við at ringja til Sernámsdepilin tlf. 360200 (Eleina Mikkelsen, skrivari).

Endalig tilmelding er, tá skeiðsgjaldið á 700 kr. er flutt á konto 9181- 1615752.

Íroknað skeiðsgjald er kaffi, te og middagsverður.

**Seinasta freist at melda til er fríggjadagin 1. mai 2009.**



## Tíðaravmarkað starv fyri fólk í barnsburðarfarloyvið

Søkt verður eftir einum framfýsnum fólki til leksiuhjálp til næmingar í Vágs- og Porkeris kommunu. Vit ynskja, at tann, ið skal setast, hevur læraraútbúgving ella líknandi førleika, skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og hava góðar samstarvseginleikar.

Arbeiðið er 15 tímar um vikuna og verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og avvarðandi fakfelag.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Niels Hammer, leiðara á Sosialu Deild tlf. 373604, ella til Sakaris Dimon, samskipara á NSR Suður tlf. 238771 ella t-post sakaris@nsrsudur.fo

Umsóknin við prógvum og møguligum viðmælum skal sendast til Sosialu Deild att.: Niels Hammer í seinasta lagi 27. apríl 2009 kl. 12.

Starvið er tíðaravmarkað frá 1. mai til 1. desember 2009

**Sosiala Deild**
**Porkeris- og Vágs Kommuna**
Við Á 8 950 Porkeri
Tlf 37 36 04- Tlf. 22 67 04
T-post: sosialadeild@email.fo



## Stuðulsstørv í Fuglafjarðar skúla

Søkt verður eftir 3 námsfrøðingum til at stuðla 4 næmingum í Fuglafjarðar skúla.

Starv 1: 24 tímar um vikuna við dreingi í 2. fl.

Starv 2: 28 tímar um vikuna við 2 dreingjum í 4. fl

Starv 3: 31 tímar um vikuna við dreingi í 7. fl.

**Førleikakrøv:** Til størvini krevst prógv sum námsfrøðingur. Um eingin námsfrøðingur fæst, verða aðrir umsøkjarar settir

**Lønar- og setanartreytir**
Størvini verða lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir, avrit av prógvi, c.v. og møgulig viðmæli, skulu vera Fuglafjarðar skúla í hendi **í seinasta lagi fríggjadagin 1. mai kl. 12.00.**

Fuglafjarðar skúli,
Traðarvegur 2,
530 Fuglafjørður

Fleiri upplýsingar um størvini fáast frá skúlastjóranum á tlf. 737761.
Teldupostur: richard.johansen@skulin.fo

Í Fuglafjarðar skúla eru 291 næmingar í 1. – 10. fl., og tað starvast 33 lærarar og hjálparfólk í skúlanum. Tú kanst lesa meiri um skúlan á heimasíðuni www.ffs.fo

**Fuglafjarðar skúli**
**Postboks 9 · FO-530 Fuglafjørður**




Sosialurin

tín tónleikafestivalur 09

**Hvønn dag í apríl mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum. Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.**
**Sendið okkum loysnina innan hósdagin 14. mai 2009 kl. 10.00 og viðmerkið brævbjálvan »Sudoku«.**

**Vinningur í apríl er 4 atgongumerki við tjalding til festivalin við Múrin. Drigið verður í viku 20.**
**Fyri at vera við í kappingini, skal øll uppgávan verða loyst.**

## APRÍL-KAPPINGIN

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7 | 3 | 6 | | | | | | |
| 4 | | | 1 | | 7 | | | |
| | 8 | 9 | | 5 | 3 | | | |
| | | | | | | 2 | 8 | |
| | 9 | | | | | | 5 | |
| | 7 | 8 | | | | | | |
| | | | 3 | 1 | | 5 | 7 | |
| | | | 6 | | 8 | | | 9 |
| | | | | | | 1 | 6 | 8 |

við Múrin

**Navn:** ______________________

**Bústaður:** ______________________

**Telefon:** ______________________

Sendið til: Sosialin · Boks 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan »Sudoku«

### Vinningurin í apríl

4 atgongumerki við tjalding til Við Múrin
**Virði Kr. 4.380,-**

SUDOKU